# **Fonn Flog** fekk luft undir veingirnar

**Tað var í kreppuárunum fyrst í 1990'unum, at Leivur og Ásla Fonn fóru undir at selja ferðseðlar, og síðani er fyritøkan Fonn Flog voksin frá lítlari kjallarafyritøku, til landsins størstu sjálvstøðugu ferðaskrivstovu**

**HANDIL**
**Dagfinn Olsen**
dagfinn@sosialurin.fo



Fyritøkan Fonn Flog er í allari stillheit voksin frá einari lítlari kjallarafyritøku til í dag at hava 13 starvsfólk við deildum í bæði Klaksvík og Runavík.

Søgan um Fonn Flog er ikki ein ljósareyð søga um lættan vinning og stórt marglæti. Søgan um Áslu og Leivur er um hvussu eitt føroyskt par við sterkum vilja og hørðum arbeiði bardi seg burtur úr kreppuni fyrst í 90'unum. Tann triða august 1992 seldu Ásla og Leivur fyrsta ferðaseðilin. Hetta var mitt í ringastu krepputíð

## Tilvild

Tað var næstan av tilvild at ferðaseðlasølan byrjaði. Mamma Áslu, Gigga við Keldu, skuldi saman við vinkonu síni, Mariu Laksafoss, fara ein túr til Danmarkar hetta summarið. Dóttir Mariu visti, at bíligir ferðaseðlar kundu keypast í donsku ferðaskrivstovuni Unitas Rejser. Leivur ger ikki mætari enn at ringja til Unitas Rejser og spyr stjóran, Knud Erik Bjerre, um hann er áhugaður í einum samstarvi.

Og síðani er bara gingið framá, og Fonnflog fekk luft undir veingirnar, og hevur í dag fleiri fólk í starvi.

Men tó gekk rúm tíð, áðrenn fyritøkan av álvara mentist, tí hjúnini valdu at taka tryggu leiðina, og ikki seta fólk í starv, ella á annan hátt útbyggja fyritøkuna, fyrr enn tryggleiki var fyri hesum.

## Ringar tíðir

Tíðirnar vóru ringar, tá fyritøkan byrjaði.

- Ongin ferðaðist Í dag ferðast øll. Men soleiðis var ikki mitt í kreppuni. - At ferðast niður á vikuskiftisferð ella til brúdleyp og konfirmatión var púra óhugsandi tá. Eingin hevði ráð at ferðast, minnist Ásla. Hóast vánaligu umstøðurnar fingu tey støðugt fleiri viðskiftafólk. Serliga vóru tað mongu handverkarnir, sum ferðaðust niður at arbeiða, sum gjørdu mun.

Bestu reklamurnar hjá Fonnflog hava verið nøgd viðskiftafólk.

## Menning

Tann triða august 1992 seldu Ásla og Leivur fyrsta ferðaseðilin.

Fonn Flog er síðani voksin frá lítlari kjallarafyritøku, til at vera landsins størsta sjálvstøðuga ferðaskrivstova við fleiri starvsfólkum.

Fonn Flog hevur deildir í Klaksvík og í Runavík, og umframt, so svarar telefoninin hjá Leivi, 535353, altíð.

*Keldur; Prát og grein í Sosialinum eftir Dorit Hansen.*










